# Vilja privatisera almennar stovnar

**Sambandsflokkurin hevur lagt fyri tingið uppskot um at privatisera Landsverkfrøðingsstovnin og Strandfaraskip Landsins**

PRIVATISERINGAR
*Eirikur Lindenskov*

Sambandsflokkurin vil hava landsstýrið at koma í tingið við lógaruppskoti um bygnaðarbroytingar og privatiseringar/útlisiteringar á Landsverkfrøðingsstovninum og Strandfaraskipum Landsins. Flokkurin skjýtur upp, at skipað verður deild undir Vinnumálastýrinum, sum skal taka sær av øllum virkseminum, sum nú er hjá Landsverkfrøðingsstovninum og hjá Strandfaraskipum Landsins.

– So nógv sum gjørligt av tí virksemi, sum nú hoyrir undir hesar stovnar, verður privatiserað og úlisiterað til privat at røkja, sigur Sambandsflokkurin í uppskotinum. Eisini skjýtur flokkurin upp, at uppgávurnar hjá nýggju deildini skulu í høvuðsheitinum vera ráðgeving, útbjóðingar og at vera eftirlitsstovnur fyri Føroya Landsstýrið.

Í viðmerkingum til uppskotið verður sagt, at lagt verður upp til eina heildarloysn, sum fevnur um báðar stovnarnar og at gera bygnaðarbroytingar í landsstýrinum.

Sambandsflokurin heldur, at vit alla tíðina eiga at stremba eftir at reka samfelagið bíligar og so effektivt, sum gjørligt. Hetta fyri at tey, sum nýta tænasturnar og skattgjaldarin skulu fáa eina so góða tænastu sum møguligt – og bíliga.

Flokkurin vísir á, at Landsverkfrøðingsstovnurin higartil hevur staðið fyri øllum infrasskipanaruppgávum, og verður nevnt sum dømi vegir, tunnlar, havnir, tyrlupallar, ferjulegur o. a. uppgávur, sum bæði eru gjørdar fyri kommunur og landsstýrið.

Sagt verður eisini, at Strandfaraskip Landsins hava staðið fyri sjóvegis flutninginum í millum oyggjarnar og hava gjørt royndir við uttanlandssigling. Harumframt rekur stovnurin eisini farmaflutning við lastbilum og trailarum, ferðafólkaflutning við bussum, bilverkstað o. a. Eisini hevur stovnurin fyrr havt tyrluflúgvingina um hendi.



*Stendur tað til Sambandsflokkin, so skulu Strandfaraskip Landsins og Landsverkfrøðingurin í størri mun verða eftirlitsstovnar, meðan uppgávurnar verða privatiseraðar ella útlisiteraðar*

Sambandsflokkurin heldur, at verandi skipan politiskt hevur verið trupul at umsitið og hevur mangan givið bæði landsstýrismonnum og løgtingsmonnum grá hár í høvdið. Skipanin hevur eisini onkuntíð verið beinleiðis orsøkin til samgonguslit.

– Flestu munnu ásanna, at skpanin hevur fingið loyvi at vaksa á ein hátt, sum ikki gevur borgaranum bestu og bíligastu tænastuna. Tí verður skotið upp, at landsstýrismaðurin skal koma við einum fullfíggjaðum uppskoti um, hvussu hetta best kann gerast, so endamálið við eini bygnaðarbroyting, privatiseringar- og útlisiteringarætlan av nevndu stonvum samlað kann verða rokkið, sigur Sambandsflokkurin.

At enda sigur flokkurin, at tænastan, sum kemur at loysa av ta verandi, skal hava sum mál at útvega borgarunum eina betri og ódýrari tænastu.

# Skal loysa seg at skifta lívshátt

**Hevur tú mist koyrikortið fyri lívstíð, so skal tað loysa seg at broyta lívsstíl, og kunna taka málið uppaftur, heldur Javnaðarflokkurin, sum mælir til lógarbroyting**

KOYRIKORT
*Eirikur Lindenskov*

Nú skulu reglurnar um, hvussu tú kanst fáa koyrikortið aftur, um tú hevur mist tað fleiri ferðir av promillu- ella rúsdrekkakoyring, gerast greiðari.

Javnaðarflokkurin hevur lagt uppskot fyri tingið um at broyta eina grein í ferðslulógini, sum snýr seg um, hvussu tú kanst søkja um at fáa koyrirættin aftur, um tú fleiri ferðir hevur mist koyrikortið – ella um tú hevur mist tað fyri lívstíð.

Broytingin er soljóðandi: »Um koyrirætturin verður frádømdur av nýggjum, áðrenn frádømingartíðin er farin, verða tær í stk. 1 og 2 nevndu freistir fyri fyriløgu fyri dómstólarnar av spurninginum um at fáa koyrirættin aftur roknaðar frá dagfestingini fyri tann seinasta dómin, ið frádømir viðkomandi koyrirættin«.

Javnaðarflokkurin sigur í viðmerkingunum, at við hesari broyting veðrur óvissan um útrokningarháttin burturbeind í málum, har fleiri fráømingartíðarskeið eru í framhaldi hvørt av øðrum. Í málum um at fáa koyrirættin aftur, áðrenn frádømingartíðin er farin, veðrur tað hereftir bara seinasti dómsdagur, sum verður avgerðandi.

Í dag verður lógin tulkað soleiðis, at freistin at leggja spurningin fyri dómstólarnar um at fáa koyrirættin aftur, áðrenn frádømingartíðin er farin, verður roknað frá tí degi, har ein áður tíðaravmerkað frádøming er lokin.

Hetta hevur við sær, at hevur tú meira enn ein dóm, so skulu frádømingartíðarskeiðini leggjast oman á hvørt annað. Tá eitt frádømingartíðarskeið er runnið, tekur frádømingartíðin í næsta dómi við. Hetta hevur við sær, at tað í fleiri førum kunnu ganga nógv ár, áðrenn spurningurin um at fáa koyrirættin aftur kann leggjast fyri dómsstólarnar.

Javnaðarflokkurin nevnir í viðmerkingunum eitt dømi:

Ein 32 ára gamal maður misti koyrirættin fyri fyrstu ferð, tá hann var 17 ára gamal við dómi í 1986. 19 ára gamal fær hann seinasta dómin í 1988. Tá hann missir koyrirættindi fyri allar tíðir. Eftir verandi lóg kann hesin maður ikki taka koyrikortið aftur fyrr enn í 2003, um hann tá lýkur treytirnar. Tá er maðurin 34 ár, og 15 ár eru liðin síðani seinasta dóm. Eisini eru nógv ár liðin, síðani maðurin var í rúsdrekkaviðgerð og broytti lívshátt. Henda søga er ikki eindømi, sigur Javnaðarflokkurin.

Flokkurin heldur, at hendan skipan hevur við sær, at fólk, sum ferð eftir ferð eru dømd fyri rúsdrekka- ella promillukoyring, sum helst eru orsakað av veruligari viðgerðarkrevjandi rúsdrekkamisnýtslu, ikki nóg væl verða stuðlað og eggjað til at fara í viðgerð fyri misnýtsluna.

Flokkurin vil við uppskotinum linka tær formligu treytirnar fyri at leggja spurningin fyri rættin um at fáa koyrirættin aftur. Útrokningarhátturin í hesum málinum verður einfaldgjørdur, og tey, ið hava mist mótið um nakrantíð at fáa koyrikortið aftur, síggja sær ein møguleika, gera tey nakað sjálv við støðuna og broyta lívshátt.

Ætlanin við uppskotinum er tó ikki at linka tær materiellu treytirnar fyri at fáa koyrikortið aftur, sigur Javnaðaflokkurin í viðmerkingunum. Men flokkurin vísir á, at sami tulkingartrupulleiki hevur verið í Danmark, seinast ferðslulógin varð broytt har, og tí vórðu tey har eisini noydd at gera somu lógarbroyting í apríl í fjør.

Javnaðarflokkurin sigur, at føroyingar, ið hava tørv á hesi lógarbroyting, hava sum støðan er í dag møguleika at flyta til Danmarkar og royna málið við rættin har, um tey annars kunnu lúka treytirnar.



*Reglarnar um, hvussu tú kanst søkja um at fáa koyrrættin aftur, hevur tú mist koyrikortið fleiri ferðir, ella fyri lívstíð, skulu gerast greiðari, heldur Javnaðarflokkurin*
*Savnsmynd*



## Sjálvstýrið útsett

Nýggja sjálvstýrissemjan hjá landsstýrinum varð ikki viðgjørd á tingfundinum í gjár, eins og ætlað. Tingformaðurin útsetti viðgerina til í dag eftir ynski frá Sambandsflokkinum.

Av tí, at málið varð lagt fram týsdagin og longu skuldi viðgerast í gjár, helt Sambandsflokkurin seg hava fingið ov lítla tíð at fyrireika seg til viðgerðina.

Høgni Hoydal legði nýggju fram sum eitt uppskot til samtyktar. Uppskotið er prentað niðanfyri

Uppskot til samtyktar:

## Sjálvstýri Føroya fólks

Ásannandi, at Føroya fólk er tjóð við ómissandi og framhaldandi sjálvsavgerðarrætti, tekur Løgtingið undir við, at farið verður undir eina miðvísa fullveldisætlan. Løgtingið tekur tískil undir við, at landsstýrið fremur hesa ætlan:

• At stjórnarvald Føroya tekur í seinasta lagi hin 1. januar 2012 við valdinum á øllum málsøkjum samsvarandi rættarstøðu Føroya fólks, undantiknum teimum, ið knýta seg beinleiðis aftur at fullveldistøku, og at stjórnarvald Føroya samsvarandi hesum rindar sjálvt fyri málsøkini.

• At fólkakirkja, revsirættarmál, persónsrættarmál, húsfólkarættarmál, arvarættarmál, fíggjarrættarmál, havumhvørvisvernd, skúlamál, Íleggingargrunnurin fyri Føroyar og Vága Floghavn fara tó undir føroyskt málsræði í seinasta lagi hin 1. januar 2002.

• At dómstólar, ákæruvald, fongsulsmyndugleikar, kriminalforsorg og almannamál fara tó undir føroyskt málsræði í seinasta lagi hin 1. januar 2004.

• At løgverja, gjaldoyramál, peningamál, fíggingarvirksemi, flogferðslumál, kortlegging og fjarskiftismál fara tó undir føroyskt málsræði í seinasta lagi hin 1. januar 2006.

• At tilbúgving og heilsumál fara tó undir føroyskt málsræði í seinasta lagi hin 1. januar 2008.

• At laga føroyska búskapin frá studningsbúskapi til sjálvberandi búskap verður farið undir at rinda fyri málsøki, ið eru farin undir føroyskt málsræði og at lækka heildarveitingarnar til Føroya úr danska ríkiskassanum samsvarandi hesum fyri ein kostnað uppá tilsamans umleið 300-400 mió. kr. í seinasta lagi hin 1. januar 2002, og at heildarveitingarnar síðan verða lækkaðar, til tær eru burtur.

• At settur verður á stovn Búskapargrunnur Føroya við serstakari løgtingslóg, ið hevur til endamáls at tryggja búskaparligu áhugamál Føroya, sum skal sita fyri inntøkum landskassans frá kolvetnisvinnu; gjaldførisinntøkum í sambandi við ognarskifti landsins; gjaldføri landskassans á innlánskontum í Landsbanka Føroya, ið hin 1. januar 2002 er oman fyri lógásetta minstainnlán landskassans í Landsbanka Føroya; heildarveitingum til Føroya úr ríkiskassa Danmarkar við gildi frá 1. januar 2002; og øðrum serinntøkum. At Búskapargrunnur Føroya letur skiftisgjøld til fíggjarlóg landsins, ið eiga at verða ásett til í mesta lagi 700 mió. kr. í 2002, sum lækka í eins stórum stigum um árið, til tey eru burtur í 2016. At fæfeingið hjá Búskapargrunni Føroya, ið eftir er, verður vart sum langtíðarsamansparing Føroya fólks.

• At áðrenn Føroyar verða skipaðar sum fullveldisríki, verður tað treytað av, at Føroya fólk tekur avgerð um hetta á fólkaatkvøðu í Føroyum.

# Fullveldi fyri góða milliard



*Tað verður 1,2 milliardir dýrari at reka Føroyar sum fullveldisríki. Men ein búskapargrunnur skal fyrstu árini útjavna meirútreiðslurnar*

**Sambært nýggjasta sjálvstýrisuppskotinum hjá landsstýrinum, hækka fyrisitingarligu útreiðslurnar við 204 milliónum, tá Føroyar eru vorðnar fullveldisríki. Blokkstuðulin á knappa milliard skal eisini burtur. Men landsstýrið ætlar, at ein búskapargrunnur skal viga upp ímóti útreiðslunum**

SJÁLVSTÝRIS-UPPSKOTIÐ
*John Johannessen*

Fyrsta viðgerð av uppskotinum til samtyktar um nýggju sjálvstýrissemjuna hjá samgonguni verður í løgtinginum í dag.

Sambært viðmerkingunum til uppskotið, eru árligu útreiðslurnar hjá Føroyum hækkaðar við góðari milliard, tá Føroyar hava fingið fullveldi.

Landsstýrið roknar við, at fyrisitingarligu útreiðslurnar á føroysku fíggjarlógini hækka við 164 milliónum, tá øll málsøki uttan ríkismál eru yvirtikin. Tá Føroyar eru vorðnar fullveldisríkið og ríkismálini tískil eisini eru yvirtikin, roknar landsstýrið við, at fyrisitingarligu útreiðslurnar hækka við umleið 40 milliónum afturat. Tað vil siga, at útreiðslurnar til fyrisiting tilsamans eru hækkaðar við umleið 204 milliónum, tá fullveldi er vorðið veruleiki.

### Blokkurin burtur

Samgonguflokkarnir eru samdir um, at blokkstuðulin úr Danmark skal minka við 300 til 400 milliónum 1. januar næsta ár. Síðani skal blokkstuðulin minka so líðandi ár um ár.

Blokkstuðulin ella heildarveitingin úr Danmark er í løtuni 993,4 milliónir krónur um árið. Tískil eru 993,4 krónur færri í inntøkum hjá landskassanum, tá blokkstuðulin er minkaður burtur í einki.

Tá henda upphædd verður løgd afturat metta fyrisitingarliga kostnaðinum av at yvirtaka øll málsøki, kunnu vit siga, at føroyska samfelagið verður umleið 1,2 milliardir dýrari fyri landskassan at reka, tá Føroyar eru vorðnar fullveldisríki.

Hesin meirkostnaðurin verður kortini ikki tveittur yvir høvdið á føroyska skattgjaldaranum í einum. Sokallaða uppskotið til samtyktar um sjálvstýri Føroya fólks leggur upp til, at málsøki so við og við verða yvirtikin eftir einum føstum leisti fram til 2012, og at vit taka yvir fyrisitingarliga kostnaðin av ávísu málsøkjunum, so hvørt vit yvirtaka tey. Somuleiðis skal blokkstuðulin minka árliga til einki er eftir, men kortini ætlar landsstýrið at høgga burtur meira enn ein triðing av blokkstuðulinum longu 1. januar næsta ár.

### Búskapargrunnur bjargar

1,2 milliardir í meirútreiðslum er nógv fyri Føroyska samfelagið. Tí inniheldur uppskotið hjá landsstýrinum ein búskapargrunn, sum tryggjar javnvág í føroyska búskapinum. Búskapargrunnurin er enn ikki settur á stovn, men skal virka frá 1. januar 2001, tá blokkstuðulin minar við 300 til 400 milliónum krónum.

Landsstýrið ætlar, at búskapargrunnurin skal kunna rinda 700 milliónir krónur inn í landskassan til fíggjarlógina næsta ár. Síðani skal grunnurin rinda eina fasta upphædd í landskassan fram til 2016. Landsstýrið roknar við, at útgjaldið úr búskapargrunninum tilsamans í mesta lagi verður 5,25 milliardir krónur.

Enn er ikki ein króna í búskapargrunninum, og hann er heldur ikki settur á stovn. Men landsstýrið ætlar at fáa hann settan á stovn sum skjótast, og síðani skulu allar serinntøkur landskassans beinast í búskapargrunnin, umframt at almennar ognir skulu seljast, fyri at fáa pening í búskapargrunnin.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, vísir í sjálvstýrisuppskotinum á, at yvirskotsgjaldførið hjá landskassanum verður roknað sum innlán í Landsbanka Føroya, ið er oman fyri lóarásetta minstainnlán landskassans í Landsbankanum. Tað vil siga, at yvirskotsgjaldførið er tann upphæddin, sum inntøkur landskassans eru oman fyri markið fyri kravið, sum Landsbankin setur.

Minstainnlánið fyri 2001 er 1.215 milliónir krónur, men er í miðar higartil 1.900 milliónir. Tískil er talan um eitt yvirskot, sum kann fara í búskapargrunnin. Verður talan um slíkt yvirskot onnur ár eisini, verður tað somuleiðis flutt búskapargrunninum. Harumframt væntar landsstýrið at fáa nógvan pening í búskapargrunnin við sølu av almennum ognum.

Andstøðan hevur víst á, at hon ikki metir hetta sum eina skilagóða ætlan. Heilt einfalt tí, at hon metir ikki roknistykkið hanga saman.

